Januar 2018

betri trygging

Tryggingartreytir

# Ársferðatrygging

# Ársferðatrygging


| | | |
|---|---|---|
| Endurgjaldsyvirlit | | 4 |
| 1.00 | Hvør kann tekna hesa trygging | 6 |
| 2.00 | Hvørji eru tryggjað | 6 |
| 3.00 | Hvar fevnir tryggingin um | 6 |
| 4.00 | Nær tekur tryggingin við | 6 |
| 5.00 | Hvørjar ferðir eru tryggjaðar | 6 |
| 6.00 | Hvørjar ferðir eru ikki tryggjaðar | 6 |
| 10.00 | Sjúka ella skaði | 7 |
| 11.00 | Heimflutningur | 8 |
| 12.00 | Fylgi við sjúklingi/boðsending | 8 |
| 13.00 | Ferðaslit | 9 |
| 14.00 | Álop | 9 |
| 15.00 | Vanlukka | 10 |
| 16.00 | Privatábyrgd | 11 |
| 17.00 | Rættarhjálp & akfarsrættarhjálp | 11 |
| 18.00 | Endurgjaldsferð og samdøgursendurgjald í sambandi við frítíðarferð | 11 |
| 18.01 | Endurgjaldsferð | 11 |
| 18.05 | Samdøgursendurgjald | 12 |
| 19.00 | Viðføri | 13 |
| 20.00 | Ov seint framkomin á uttanlandsferð | 13 |
| 21.00 | Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað | 13 |
| 22.00 | Frítíðaríbúðartrygging | 14 |
| 23.00 | Skeiv læknalig viðgerð | 14 |
| 24.00 | Leiting og bjarging | 14 |
| 25.00 | Kreppuhjálp | 14 |
| 26.00 | Kreppuhjálp til avvarandi um telefon | 14 |
| 27.00 | Sálarfrøðihjálp | 15 |
| 28.00 | Yvirgangur | 15 |
| 29.00 | Evakuering | 15 |
| 30.00 | Gíslatøka | 15 |
| 31.00 | Ítróttur | 16 |
| 32.00 | Leigubilur undan fráferð | 16 |
| 33.00 | Leigubilur uttanlands | 16 |
| 34.00 | Ársavlýsingartrygging – tilval | 16 |
| 50.00 | Felagstreytir | 18 |
| 51.00 | Tørvar tær hjálp á ferðini | 18 |
| 52.00 | Virkin Skaðahjálp | 18 |
| 53.00 | Tá skaði er | 18 |
| 54.00 | Tryggingarhæddir | 18 |
| 55.00 | Vanlig undantøk | 18 |
| 56.00 | Aðrar tryggingar | 18 |
| 57.00 | Dupulttrygging | 18 |
| 58.00 | Endurgjaldskravið avhendað | 18 |
| 59.00 | Aftursókn | 19 |
| 60.00 | Ósemjur | 19 |
| 61.00 | Innanhýsis kæruviðgerð | 19 |
| 62.00 | Kærunevndin | 19 |
| 63.00 | Angringarrættur | 19 |
| 64.00 | Heimating | 19 |

betri trygging

# Ársferðatrygging

## Tryggingin er eitt ískoyti til tína innbústrygging

Tryggingarskjalið og -kortið, sum tú hevur fingið útflýggjað, siga frá, hvussu tú ert tryggjaður á ferðini.

## Bráðfeingishjálp

Hevur tú brúk fyri bráðfeingishjálp á ferðini, so ring til:

SOS-INTERNATIONAL A/S
Telefon: +45 38 48 91 22
Telefax: +45 70 10 50 56
Teldupostur: sos@sos.eu

**Svarar alt samdøgrið**

## Fráboðan til løgreglu

Verður tú fyri stuldri, álopi, herverki o.tl., skal tað fráboðast løgregluni á staðnum. Minst til at fáa váttan fyri fráboðan ella løgreglufrágreiðing heim við.

## Læknaváttan

Verður tú sjúkur, fyri vanlukku o.l., skal hetta fráboðast læknanum á staðnum. Minst til at fáa nágreiniliga lýsta læknaváttan o.l. heim við.

## Skjalprógv

Øll krøv mótvegis Betri Trygging skulu skjalprógvast.

# Ársferðatrygging

## Endurgjaldsyvirlit

| Tryggingarhædd fyri hvønn ferðandi | Norðurlond / Stóra Bretland | Evropa | Allur heimurin |
|---|---|---|---|
| § 10.00 Sjúka ella skaði | Seravtala § 10.01 | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 10.02, d. Fysioterapi, kiropraktor v.m. | Max. kr. 20.000 | Max. kr. 20.000 | Max. kr. 20.000 |
| § 10.02, e. Tannlækni | Max. kr. 15.000 | Max. kr. 15.000 | Max. kr. 15.000 |
| § 10.02, i. Telefon, lesnaður o.tl. | Kr. 500 pr. viku | Kr. 500 pr. viku | Kr. 500 pr. viku |
| § 10.02, j. Leiga av sjónvarpi, teldu o.tl. | Kr. 1.000 pr. viku<br>Max. kr. 3.000 | Kr. 1.000 pr. viku<br>Max. kr. 3.000 | Kr. 1.000 pr. viku<br>Max. kr. 3.000 |
| § 10.02, l. Góðkent vistarhald | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag |
| § 11.00 Heimflutningur | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 11.01, c. Vistarhald | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag |
| § 11.01, e. Vistarhald | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag |
| § 12.00 Fylgi við sjúklingi/boðsending | 3 persónar | 3 persónar | 3 persónar |
| § 12.01, b. 3. Vistarhald | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag | Kr. 1.500 pr. dag |
| § 13.00 Ferðaslit | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 13.05 Ferðaslit – heimflutningur av bili | Max. kr. 30.000 | Max. kr. 30.000 | Max. kr. 30.000 |
| § 14.00 Álop | Max. kr. 600.000 | Max. kr. 600.000 | Max. kr. 600.000 |
| § 15.06 Vanlukka: Deyði<br>Avlamni | Kr. 200.000<br>Kr. 400.000 | Kr. 200.000<br>Kr. 400.000 | Kr. 200.000<br>Kr. 400.000 |
| § 15.07 Tannskaði | Max. kr. 15.000 | Max. kr. 15.000 | Max. kr. 15.000 |
| § 16.01 Privatábyrgd: Skaði á fólk<br>Skaði á lutir | Kr. 10.000.000<br>Kr. 2.000.000 | Kr. 10.000.000<br>Kr. 2.000.000 | Kr. 10.000.000<br>Kr. 2.000.000 |
| § 17.01 Rættarhjálp og akfarsrættarhjálp | Kr. 200.000 | Kr. 200.000 | Kr. 200.000 |
| § 18.02 Endurgjaldsferð | Einstaklingur Kr. 30.000<br>Húskið Kr. 60.000 | Einstaklingur Kr. 30.000<br>Húskið Kr. 60.000 | Einstaklingur Kr. 30.000<br>Húskið Kr. 60.000 |
| § 18.06 Samdøgursendurgjald | Kr. 1.500 pr. dag pr. tryggjaða.<br>Max kr. 15.000 | Kr. 1.500 pr. dag pr. tryggjaða.<br>Max kr. 15.000 | Kr. 1.500 pr. dag pr. tryggjaða.<br>Max kr. 15.000 |
| § 19.02, a. Virkin skaðahjálp | 10 % av tryggingarhæddini fyri innbúgv. Tó í mesta lagi kr. 15.000 | 10 % av tryggingarhæddini fyri innbúgv. Tó í mesta lagi kr. 15.000 | 10 % av tryggingarhæddini fyri innbúgv. Tó í mesta lagi kr. 15.000 |
| § 19.02, b. Viðføri, sí Innbústryggingina Viðførisseinkan | Kr. 1.200 pr. dag<br>Max. kr. 4.800 | Kr. 1.200 pr. dag<br>Max. kr. 4.800 | Kr. 1.200 pr. dag<br>Max. kr. 4.800 |
| § 20.02 Ov seint framkomin á uttanlandsferð | Fyri at fullføra ferðina óavmarkað.<br>Vistarhald kr. 1.500 pr. dag | Fyri at fullføra ferðina óavmarkað.<br>Vistarhald kr. 1.500 pr. dag | Fyri at fullføra ferðina óavmarkað.<br>Vistarhald kr. 1.500 pr. dag |
| § 21.03 Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað | Kr. 1.000 pr. dag.<br>Max. kr. 4.000 | Kr. 1.000 pr. dag.<br>Max. kr. 4.000 | Kr. 1.000 pr. dag.<br>Max. kr. 4.000 |
| § 22.02 Frítíðaríbúðartrygging | Max. kr. 2.000 pr. dag<br>(max. 25.000 pr. tr.) | Max. kr. 2.000 pr. dag<br>(max. 25.000 pr. tr.) | Max. kr. 2.000 pr. dag<br>(max. 25.000 pr. tr.) |
| § 23.04 Skeiv læknalig viðgerð | Max. kr. 1.000.000 pr. ferð | Max. kr. 1.000.000 pr. ferð | Max. kr. 1.000.000 pr. ferð |

***Framhald á næstu síðu.***

# Ársferðatrygging

## Endurgjaldsyvirlit *framhald*

| Tryggingarhædd fyri hvønn ferðandi | Norðurlond / Stóra Bretland | Evropa | Allur heimurin |
|---|---|---|---|
| § 24.05 Leiting og bjarging | Max. kr. 400.000 pr. hending | Max. kr. 400.000 pr. hending | Max. kr. 400.000 pr. hending |
| § 25.00 Kreppuhjálp | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 26.00 Kreppuhjálp um telefon | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 27.01 Sálarfrøðihjálp | Kr. 10.000 | Kr. 10.000 | Kr. 10.000 |
| § 28.00 Yvirgangur | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 29.00 Evakuering | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 29.04 Evakuering – Tryggjaði afturhildin | Uppihald og innanríkisflutningur: Kr. 60.000. Matur: Kr. 500 pr. dag | Uppihald og innanríkisflutningur: Kr. 60.000. Matur: Kr. 500 pr. dag | Uppihald og innanríkisflutningur: Kr. 60.000. Matur: Kr. 500 pr. dag |
| § 30.00 Gíslatøka | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |
| § 31.01 Ítróttur | Kr. 300/600/3.000 | Kr. 300/600/3.000 | Kr. 300/600/3.000 |
| § 32.00 Leigubilur undan fráferð – Treytað av at skrokktrygging er teknað fyri bilin | | | |
| § 33.00 Leigubilur uttanlands | Óavmarkað | Óavmarkað | Óavmarkað |

## Ískoyti

| | |
|---|---|
| § 34.05 Ársavlýsingartrygging | Einstaklingur kr. 30.000 íalt fyri hvørja einstaka ferð.<br>Húskið kr. 60.000 í alt fyri hvørja einstaka ferð fyri øll tey tryggjaðu. |

# Ársferðatrygging

## 1.00 Hvør kann tekna hesa trygging

**1.01** Tú kanst tekna hesa trygging, um tú hevur eina Innbústrygging í Betri Trygging. Tað er ein treyt, at tú býrt í Føroyum og skalt á ferð við fráferð úr Føroyum.

## 2.00 Hvørji eru tryggjað

**2.01** Um tryggingin er teknað fyri alt húskið fevnir tryggingin um tryggingartakaran við húski og fastbúgvandi meðhjálp.

**2.02** Tryggingartakarin er tann, ið hevur teknað tryggingina. Teir persónar, ið tryggingin fevnir um, verða nevndir teir tryggjaðu.

**2.03** Við húski er at skilja: Húsfólk, herundir fosturbørn, ið búgva hjá tryggingartakaranum. Heruppí eru at rokna eisini persónar, ið liva í føstum paralag við tryggingartakaranum og/ella heimabúgvandi børnum teirra. Tryggingin fevnir bert um hesar persónar, um teir eru tilmeldaðir fólkayvirlitinum at hava fastan bústað á sama stað, sum tryggingartakarin.

**2.04** Niðanfyri nevndu eru tryggjað, um tey ikki eru fevnd av aðrari trygging:

- Skiftisbørn
- Umlættingarbørn, tá tey ferðast við tryggjaða
- Skiftisnæmingar, meðan teir búgva hjá tryggjaða
- Hjúnafelagi/sambúgvi á røktarheimi, sambýli o.tl.

**2.05** Tryggingin fevnir harumframt um børn undir 21 ár, sum búgva í Norðurlondum og Stóra Bretlandi.

Treytin er tó, at tey búgva einsamøll og ikki hava fastbúgvandi børn hjá sær.

Hetta er galdandi sjálvt um ferðin ikki byrjar og endar í Føroyum, sí grein 4.

Á ferð aftur og fram til Føroya er tryggingin tó bert galdandi á ferðini millum bústaðin í Norðurlondum/Stóra Bretlandi og bústaðin í Føroyum.

Á ferðum til onnur lond er ársferðatryggingin galdandi í upp til 60 dagar eftir vanligum reglum.

Hóast barnið býr í Norðurlondum/Stóra Bretlandi hevur tað rætt til heimflutning v.m. til Føroya, um hetta er eitt ynski frá tryggjaða.

**2.06** Um tryggingin er teknað fyri einstakling, fevnir tryggingin bert um tryggjaða.

## 3.00 Hvar fevnir tryggingin um

**3.01** Tú kanst velja millum trý ymisk landafrøðilig øki:

**a.** Norðurlond/Stóra Bretland: Danmark, Noreg, Svalbard, Svøríki, Finland, Ísland, Grønland, Ongland, Skotland, Wales, Norður Írland og Hetland.

**b.** Evropa: Landafrøðiliga Evropa eystur at Ural, Asia og Afrika fram at Miðjarðarhavi, Jordan, Kanariuoyggjar, Madeira, Azorurnar og Írland.

**c.** Allur Heimurin: Lond, ið ikki eru nevnd undir Norðurlond/Stóra Bretland og Evropa.

## 4.00 Nær tekur tryggingin við

**4.01** Tryggingin tekur við frá teirri løtu, tú fert úr bústaði tínum í Føroyum – ella frá tí tryggingin er teknað, um tú tryggjar teg seinni – og heldur uppat, tá tú ert aftur við hús í Føroyum, ella tá tryggingartíðin er av, um hon er av, áðrenn tú ert aftur við hús í Føroyum.

**4.02** Sí tó grein 2.05 um børn undir 21 ár, sum búgva í útlandinum.

**4.03** Er heimkoman seinkað, men ikki av egnum ávum, verður tryggingartíðin longd samsvarandi, tó í mesta lagi við 14 døgum. Eykagjald verður ikki kravt.

## 5.00 Hvørjar ferðir eru tryggjaðar

**5.01** Hendan trygging umfatar frítíðarferðir, íroknað lestrarferðir og lestrarørindi. Eisini umfatar tryggingin frítíðarferðir saman við vinnuørindum. Tó eru dagarnir, sum tú ert í vinnuørindum, ikki umfataðir av hesi trygging. Hvør einstøk ferð kann vara í upp til 60 dagar.

## 6.00 Hvørjar ferðir eru ikki tryggjaðar

**6.01** Ferðir í vinnuørindum, íroknað starvsvenjing. Er talan um frítíðarferð saman við vinnuørindum, eru dagarnir, sum tú ert í vinnuørindum, ikki umfataðir av hesi trygging.

betri trygging

# Ársferðatrygging

## 10.00 Sjúka ella skaði

**10.01 Seravtalur**
Henda trygging fevnir ikki um útreiðslur, sum verða goldnar sambært Norðurlendsku Samstarvsavtaluni ella sáttmálanum millum Stóra Bretland og Føroyar. Tryggingin fevnir heldur ikki um útreiðslur, sum verða endurgoldnar av Heilsutrygd.

**10.02 Tryggingin fevnir um**
Verður tú brádliga sjúkur ella skaddur á ferðini, rindar tryggingin vanligar, hóskandi og neyðugar útreiðslur til:

**a.** viðgerð hjá góðkendum lækna,

**b.** sjúkrahúslegu eftir læknaráðum, tó í mesta lagi útreiðslur til dupulta seingjarstovu,

**c.** heilivág eftir læknaráðum,

**d.** viðgerð hjá fysioterapeuti, kiropraktori ella øðrum viðgera, sum ikki er lækni, tó í mesta lagi kr. 20.000,

**e.** viðgerð hjá tannlækna, tó í mesta lagi kr. 15.000,

**f.** sjúkraflutning til og frá viðgerðarstaði,

**g.** hýruvogn til og frá viðgerðarstaði,

**h.** sjúkraflutning til hóskiligt viðgerðarstað, ið er stytst frá, í samráð við SOS-international,

**i.** telefon, lesnað o.t., tá tryggjaði er lagdur inn á sjúkrahús, kr. 500 um vikuna. Hesar útreiðslur skulu ikki skjalprógvast,

**j.** leigu av sjónvarpi, teldu o.tl. við upp til kr. 1.000 um vikuna, tó í mesta lagi kr. 3.000 tilsamans,

**k.** longda ferðatrygging, um so er, at ferðin heim verður seinkað,

**l.** vistarhald sambært góðkenning frá SOS-International, um viðgerð, ið annars hevði havt við sær innlegging á sjúkrahúsi, kann verða gjørd ambulant, við í mesta lagi kr. 1.500 um dagin. Talan er um eyka útreiðslur, ið standast av hesum.

**m.** Tryggingin fevnir eisini um útreiðslur í sambandi við barnsburð fram til 4 vikur undan væntaðari føðing. Tað vil siga útreiðslur í sambandi við:

- føðing
- viðgerð av mammu og barni í sambandi við føðingina
- viðgerð av barnakonu
- viðgerð av óføddum barni.

Hesar útreiðslur verða goldnar av tryggingini hjá mammuni.

**10.3 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin rindar ikki fyri útreiðslur til:

**a.** heilivág, sum lækni ikki hevur ávíst,

**b.** føðing ella sjúkuviðgerð í sambandi við barnsburð seinni enn 4 vikur undan væntaðari føðing,

**c.** provokeraða fosturtøku,

**d.** at endurrinda, skifta ella umvæla handilstenn, brillur, kontaktlinsur og/ella hoyritól,

**e.** uppihald á heilsubótar- ella hvíldarheimi,

**f.** viðgerð ella sjúkrahúsuppihald av einum og hvørjum slagi, uttan mun til orsøk, eftir at komið er aftur til Føroya, sí tó grein 27.01,

**g.** framhaldandi viðgerð og uppihald, um tryggjaði sýtir at verða heimfluttur, tá læknin hjá SOS-International, hevur tikið støðu til heimflutningin,

**h.** viðgerð og uppihald uttanlands, tá ið læknin hjá SOS-International hevur avgjørt og læknin, sum viðger, hevur góðtikið, at viðgerðin kann bíða til eftir heimkomuna,

**i.** sjúkraflutning, tí tryggjaði óttast smittuvanda, har hann er staddur,

**j.** at tryggjaði ikki fylgir ávísingunum frá læknanum hjá SOS-International,

**k.** viðgerð av verandi ella varandi sjúku og líðingar í tí sambandi, t.v.s. líðingar, sum hava havt við sær sjúkutekin ella eru staðfestar, áðrenn farið var úr Føroyum, uttan so at sjúkan, innanfyri teir seinastu tveir mánaðarnar undan fráferð úr Føroyum, ikki hevur havt við sær innlegging á sjúkrahúsi ella broyting í ásettum heilivági,

**l.** endurgjald um so er, at tryggjaði ikki er farin til lækna ella hevur sýtt fyri viðgerð av eini sjúku, hóast tryggjaði átti at vitað ella havt illgruna um, at sjúkan kravdi viðgerð ella var munandi versnað, áðrenn farið var úr Føroyum. Sama er galdandi, um so er, at tryggjaði er givin upp, ella sýtt er fyri at viðgera hann í Føroyum.

# Ársferðatrygging

**10.04 Avmarking**
Útreiðslurnar, sum henda trygging fevnir um, verða bert endurgoldnar, um tú heldur teg til leiðbeiningarnar, sum læknin, ið viðger teg og læknin hjá SOS-International, ávísa. Verða hesar leiðbeiningar ikki fylgdar, verður endurgjaldið lækkað samsvarandi teimum útreiðslum, sum roknast kann við, um leiðbeiningarnar vóróu fylgdar.

## 11.00 Heimflutningur

**11.01 Tryggingin fevnir um**
Er sjúka ella skaði á ferðini sambært grein 10.00, rindar tryggingin eykaútreiðslur til:

**a.** heimflutning við vanligu ferðaleiðini ella sjúkrabili, um so er, at læknin sum viðger og læknin hjá SOS-International halda, at tílíkur heimflutningur er neyðugur og ráðiligur,

**b.** heimflutning við sjúkraflutningsflogfari, um so er, at læknin hjá SOS-International viðmælir tí, og SOS-International skipar fyri heimflutninginum,

**c.** vistarhald á hotelli, tá tryggjaði hevur ligið á sjúkrahúsi, og til heimferðin ella heimflutningurin kann verða, við í mesta lagi kr. 1.500 um dagin,

**d.** at fáa fatur aftur á ferðalagnum eftir viðgerð, hagar tryggjaði skuldi verða sambært fastløgdu ferðaætlanini,

**e.** vistarhald á hotelli til tryggjaði fær fatur aftur á ferðalagnum sambært grein 11.01.d., tó í mesta lagi kr. 1.500 um dagin. Hetta er tó ikki galdandi, um tryggjaði er heimfluttur til Føroya,

**f.** heimflutning, tí tryggjaði er deyður, íroknað útreiðslur til t.d. balsamering og sinkkistu ella útreiðslur til at verða brendur og/ella til jarðarferð á staðnum, sambært umbøn frá avvarðandi, men í mesta lagi eina upphædd, sum samsvarar útreiðslunum at flyta børuna heim. Betri Trygging kann krevja líkskurð.

**11.02** Harafturat fevnir tryggingin um heimflutning av børnum undir 18 ár, sum eru við í ferðini og hava ferðatrygging í Betri Trygging, um so er, at foreldur teirra ella fylgdarfólk verða flutt heim, orsakað av sjúku, skaða ella andláti.

**11.03** Eisini fevnir tryggingin um flutning, ið er fevndur av hesi trygging, og sum ikki er fyriskipaður av Betri Trygging ella SOS-International. Goldin verður ein upphædd, sum svarar til útreiðslurnar, ið Betri Trygging hevði havt í sambandi við samsvarandi flutning.

**11.04 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur til heimflutning, um orsøkin er, at tryggjaði óttast smittuvanda, har hann er staddur.

## 12.00 Fylgi við sjúklingi/boðsending

**12.01 Tryggingin fevnir um**
Er sjúka ella skaði á ferðini sambært grein 10.00, ella andlát, rindar tryggingin eykaútreiðslur til:

**a.** flutning av fylgdarfólki við tryggjaða til heimabústaðin,

**b.** flutning av fólki, sum er boðsent til tryggjaða. Rindað verður í mesta lagi fyri 3 fólk eftir egnum ynski, fyri:

**1.** vanligan flogferðaseðil á vanligari flogleið,

**2.** flutning á staðnum,

**3.** vistarhald á hotelli við í mesta lagi kr. 1.500 um dagin,

**4.** ferðatrygging til tey boðsendu,

**5.** flutning av fylgdarfólki aftur hagar, ferðin við tryggjaða byrjaði ella hagar, fylgdarfólkið, sambært fastløgdu ferðaætlan síni, skuldi verið komið. Flutningurin skal fara fram innan 2 vikur eftir heimkomuna.

**12.02** Harafturat fevnir tryggingin um heimflutning av børnum undir 18 ár, sum eru við í ferðini og hava ferðatrygging í Betri Trygging, um so er, at foreldur teirra ella fylgdarfólk verða flutt heim, orsakað av sjúku, skaða ella andláti.

**12.03** Eisini fevnir tryggingin um flutning, ið er fevndur av hesi trygging, og sum ikki er fyriskipaður av Betri Trygging ella SOS-International. Goldin verður ein upphædd, sum svarar til útreiðslurnar, ið Betri Trygging hevði havt í sambandi við samsvarandi flutning.

**12.04 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur fyri flutning í sambandi við boðsending út til tryggjaða, um so er, at tryggjaði verður fluttur heim innan 3 samdøgur frá tí, at boðsendi skuldi fara úr Føroyum.

# Ársferðatrygging

## 13.00 Ferðaslit

**13.01 Hvønn fevnir tryggingin um**
Tryggingin fevnir um tryggjaða og eitt fylgdarfólk eftir egnum ynski.

**13.02 Tryggingin fevnir um**
Tryggingin fevnir um eyka ferðaútreiðslur, sum verða lagdar á tryggjaða og tann, ið fylgir við tryggjaða, um so er, at ferðin verður slitin fyrr enn ætlað, av tí at:

**a.** ein av næstringunum brádliga er vorðin álvarsliga sjúkur ella skaddur, og hetta hevur kravt sjúkrahúslegu, ella, um so er, at onkur av næstringunum er deyður. Næstringar í hesum týdningi eru:

1. hjúnafelagi ella sambúgvi, sum í fólkayvirlitinum hevur sama bústað sum tryggjaði
2. foreldur
3. verforeldur
4. børn
5. fosturbørn
6. børn hjá systkjum
7. verdóttir og versonur
8. ommu- og abbabørn
9. systkin
10. omma/abbi
11. svigarinna/svágur
12. langomma/langabbi
13. langommu- og langabbabarn

**b.** munandi broytingar eru í viðurskiftunum hjá tryggjaða, privat sum arbeiðsliga, og váttast kann, at tað av fíggjarligum ávum krevst, at tryggjaði kemur á staðið, (t.d. eldur, vatnskaði, innbrot, arbeiðssteðgur).

**13.03** Harafturat fevnir tryggingin um heimflutning av børnum undir 18 ár, sum eru við í ferðini og hava ferðatrygging í Betri Trygging, um so er, at foreldur teirra ella fylgdarfólk verða flutt heim, orsakað av sjúku, skaða ella andláti.

**13.04** Eisini fevnir tryggingin um flutning, ið er fevndur av hesi trygging, og sum ikki er fyriskipaður av Betri Trygging ella SOS-International. Goldin verður ein upphædd, sum svarar til útreiðslurnar, ið Betri Trygging hevði havt í sambandi við samsvarandi flutning.

**13.05** Verður ferðast í bili, kann annað flutningsfar enn bilur verða nýtt til heimflutningin, um hetta er avtalað við SOS-International. Í slíkum føri rindar tryggingin eisini eyka-útreiðslur til heimflutning av bilinum, húsvogninum ella viðfestisvogninum, tó treytað av, at ongin av hinum, sum luttaka í ferðini, eru før fyri at koyra bilin heim. Endurgjaldið í hesum føri er tó í mesta lagi kr. 30.000.

**13.06** Um so er, at ferðin verður uppafturtikin, verða goldnar rímiligar eyka ferðaútreiðslur fyri tryggjaða og fylgdarfólkið aftur hagar, ferðin varð slitin ella hagar, hesi, sambært fastløgdu ferðaætlan síni, skuldu verið komin. Endurgjaldið fyri tryggjaða er treytað av, at hesin ikki hevur rætt til endurgjaldsferð.

**13.07 Avmarkingar**
**a.** Flutningur verður í mesta lagi endurgoldin við vanligum flogferðaseðli á vanligari flogleið.

**b.** Treytin fyri endurgjaldi er, at ferðaslitið er meira enn 12 tímar, áðrenn ætlaða heimkomu.

**13.08 Hvørjar skyldur hevur tryggjaði**
**a.** Fer onkur av næstringunum á sjúkrahús ella doyr, skal tryggjaði, sum prógv fyri ferðaslitinum, útvega váttan frá viðkomandi lækna.

**b.** Er brotið inn, ella er annar brotsligur tilburður, skal tryggjaði, sum váttan fyri ferðaslitinum, útvega løgreglu-frágreiðing.

## 14.00 Álop

**14.01 Tryggingin fevnir um**
Verður tryggjaði álopin av fólki, og hevur hetta við sær persónskaða, sum kann ávísast, rindar tryggingin eftir teimum reglum, sum ein skaðavaldari vildi verið dømdur at gjalda í samsvari við føroyska rættarsiðvenju fyri álop, sum var hent undir líknandi umstøðum í Føroyum.

Tryggingin veitir endurgjald upp til 600.000 kr. pr. hending.

**14.02 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um:

**a.** skaða, sum ferðafelagi elvir tryggjaða. Við ferðafelaga skilst ein, sum hevur keypt ferðina við tí endamáli at ferðast saman við tryggjaða. Vanliga er hesin nevndur á sama ferðaseðli/ferðaskjali sum tryggjaði,

# Ársferðatrygging

**b.** skaða, sum stendst av, at tryggjaði hevur verið drukkin, og rúsanin er høvuðsatvoldin til skaðan,

**c.** skaða á lutir í sambandi við álop.

**14.03 Hvørjar skyldur hevur tryggjaði**
Treytin fyri endurgjaldi er, at tryggjaði beinanvegin, hann var álopin, boðar løgregluni frá álopinum.

## 15.00 Vanlukka

**15.01 Hvat er vanlukkutilburður**
Tryggingin gevur rætt til skaðabót fyri vanlukkutilburð, sum er at skilja sum ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða.

**15.02 Tryggingin fevnir um**
Tryggingin rindar endurgjald fyri varandi mein – avlamisendurgjald – ella um tryggjaði doyr av vanlukku.

**15.03 Avlamisendurgjald**
**a.** Tryggjaði hevur rætt til at fáa avlamisendurgjald, um so er, at hann hevur fingið varandi mein av vanlukkuni, tó í minsta lagi 5% avlamin. Hvussu avlamin tryggjaði er, verður avgjørt, so skjótt tað er læknaliga gjørligt, tó ikki seinni enn 3 ár eftir vanlukkuna.

**b.** Tað er ein treyt, skal avlamisendurgjaldið verða útgoldið, at tryggjaði er á lívi, tá endurgjaldið verður útgoldið.

**c.** Hvussu avlamin tryggjaði er, verður avgjørt eftir læknafrøðiligu avlamisstøðuni, tryggjaði er í, og tað ávirkar ikki tryggingarveitanina, hvat arbeiðið tryggjaði hevur.

**d.** Avlamisendurgjaldið er tann prosentparturin av tryggingarhæddini, sum svarar til, hvussu avlamin tryggjaði er.

**e.** Hvussu avlamin tryggjaði er, tí hann hevur mist fleiri likamslutir, kann samanlagt ikki fara upp um 100%. Avlamni, ið var undan vanlukkutilburðinum, gevur ikki rætt til endurgjald.

**f.** Tryggingin rindar harafturat endurgjald í sambandi við avlamni sum beinleiðis fylgja av tropusjúku íkomin á ferðini. Endurgjaldið verður roknað sambært grein 15.3.a til og við 15.3.e.

Treytin fyri endurgjaldi er, at tryggjaði hevur hildið seg til tilmælið frá WHO og/ella danska Statens Seruminstitut, viðvíkjandi koppseting og profylakse, herundir medisinsk malaria profylakse, tá ferðast verður í viðkomandi øki.

**15.04 Deyðsendurgjald**
**a.** Er tryggjaði deyður av vanlukkutilburðinum innan trý ár eftir vanlukkuna, verður tryggingarhæddin fyri andlát útgoldin.

**b.** Er ikki annað fráboðað okkum skrivliga, verður tryggingarhæddin goldin næsta avvarðandi.

**c.** Um avlamisendurgjald er goldið, tí tryggjaði hevur verið fyri vanlukkutilburði og seinni doyr av hesum tilburði, verður endurgjaldið, hann hevur fingið útgoldið fyri avlami, mótroknað deyðsendurgjaldinum.

**15.05 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um avlamni ella andlát, sum staðist hevur av:

**a.** sjúkum og/ella útbroti av fjaldum sjúkuílegum, hóast sjúkan er uppkomin ella versnað av vanlukkutilburði,

**b.** versnaðum fylgjum eftir vanlukkutilburð, sum standast av verandi sjúku ella sjúku, sum kemur uppí,

**c.** yrkisítrótti.

**15.06 Avmarking í sambandi við flúgving**
Tryggingin fevnir bert um vanlukku, sum rakar tryggjaða, meðan hann er ferðafólk við tjóðmerktum flogfari.

Hóast tryggjaði hevur fleiri vanlukkutryggingar, so er alt endurgjaldið, um tílík vanlukka skuldi borist á, avmarkað at vera kr. 10 mió., um tryggjaði verður avlamin, og kr. 5 mió., um tryggjaði doyr. Henda upphædd verður býtt lutfalsliga millum tryggingarnar.

**15.07 Tannskaði**
Tryggingin veitir endurgjald fyri tannskaða, tó í mesta lagi kr. 15.000. Tað er ein treyt, at tannviðgerðin verður framd á ferðini. Tannviðgerð, sum er framd, eftir at komið er aftur til Føroya, verður ikki goldin.

**15.08 Undantak**
Tryggingin fevnir ikki um tannskaðar:

**a.** sum berast á, tá tugt verður, uttan mun til, hvør orsøkin er til tyggiskaðan,

**b.** sum eru íkomnir ella versnaðir, tí tenninar hjá tryggjaða, sambært meting av tannlækna, hava verið í munandi verri standi enn hjá fólki um sama aldur, sum ganga til regluligt tannlæknaeftirlit og fáa ta viðgerð, sum mælt er til í tí sambandi.

# Ársferðatrygging

## 16.00 Privatábyrgd

**16.01** Viðvíkjandi ábyrgd verður víst til Innbústrygging tína.

Tryggingarhæddir:

| | |
|---|---|
| Fyri skaða á lutir og djór: | Kr. 2.000.000. |
| Fyri skaða á fólk: | Kr. 10.000.000. |

**16.02** Sum ískoyti til privatu ábyrgdartryggingina fevnir Ársferðatryggingin, sambært galdandi lóg í tí landinum, har skaðin hendi, um endurgjaldsábyrgd fyri skaða á leigaða frítíðaríbúð/hotell og innbúgv í frítíðaríbúðini/hotellinum, við eini sjálvábyrgd á kr. 500 fyri hvønn skaða.

## 17.00 Rættarhjálp & akfarsrættarhjálp

**17.01** Viðvíkjandi rættarhjálp verður víst til Innbústrygging tína.

Tryggingin veitir endurgjald upp til 200.000 kr. pr. hending.

Viðvíkjandi akfarsrættarhjálp, verður víst til møguliga skrokktrygging fyri akfarið.

**17.02 Rættarhjálp**
**a.** Sum ískoyti til privatu rættarhjálpartryggingina fevnir Ársferðatryggingin um ferðakostnað í sambandi við ávísar privatar rættartrætur á ferð tryggjaða, og møguligar ferðaútreiðslur, sum eru neyðugar, um so er, at tryggjaði skal avhoyrast sum vitni ella partur í sambandi við eitt rættarmál í útlandinum, sum er íkomið á eini frítíðarferð í tryggingartíðini.

**b.** Tryggingin fevnir um ferðakostnað í sambandi við eina rættar- ella gerðarættarsak í føri:

- har tryggjaði skal vera hjástaddur, so málið kann verða framt, og rætturin hevur innkallað tryggjaða til partsavhoyringar,
- har tryggjaði er innkallaður sum vitni, um so er, at hann hevur rættarligan áhuga í at vitna í hesum landi, og tað ikki er gjørligt at hava vitnisavhoyringarnar í Føroyum.

Flutningsútreiðslur verða goldnar við í mesta lagi vanligum flogferðaseðli.

**17.03 Trygdarveðhald**
Tryggingin fevnir eisini um trygdarveðhald. Við veðhald er at skilja rindan, ið støðugt ella fyribils kann loysa tryggjaða ella ognarlutir hansara frá at verða afturhildnir av myndugleikum á staðnum.

**a.** Veðhaldið verður veitt sum rentufrítt lán, ið skal verða afturgoldið Betri Trygging beinanvegin, tá veðhaldið er loyst.

**b.** Verður hald lagt á veðsetingina, tí tryggjaði ikki hevur rindað bót, sum løgd er á hann, ella endurgjald, tí tryggjaði ikki møtir á rættarfundi, ella tí tryggjaði í aðrar mátar hevur ábyrgd av haldleggingini, verður haldleggingin roknað sum rentufrítt lán, sum skal verða goldið Betri Trygging beinanvegin eftir haldleggingina.

**17.04 Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur í sambandi við rættar- og gerðarættarsakir:

**a.** millum tryggjaða og ferðamannastovuna, ferðamannafelagið, ferðaleiðaran ella ferðamillumgongumannin,

**b.** sum ikki hendu á ferðini,

**c.** um orsøkin til málið stendst av sjálvvoldum rúsi, og rúsanin er høvuðsatvoldin,

**d.** í sambandi við verulig endurgjøld, bøtur ella krøv, ið líkjast bót.

**17.05** Avmarkingar og undantøk í fullfíggjaðu treytunum fyri trygging til rættarhjálp, eru ikki galdandi fyri trygdarveðhald, sí grein 17.03.

**17.06 Sjálvábyrgd**
Sjálvábyrgdin er 10% av øllum kostnaðinum, tó í minsta lagi kr. 500. Hetta er tó ikki galdandi fyri trygdarveðhald.

## 18.00 Endurgjaldsferð og samdøgursendurgjald í sambandi við frítíðarferð

**18.01 Endurgjaldsferð**

**Tryggingin fevnir um**
Tryggingin veitir endurgjald í teimum førum ferðin og uppihaldið hjá teimum tryggjaðu sambært grein 2.00 fara fyri skeyti av:

**a.** bráðkomnari sjúku, ella skaða sambært grein 10. Treytin er, at tryggjaði er lagdur á sjúkrahús, ella lækni hevur rátt tryggjaða til frið og hvíld í og nær við frítíðarbústaðin í meira enn helvtina av tíðini, ferðin varar. Tað er av týdningi at hava nágreiniliga lýsta læknaváttan o.tl. heim við av ferðini.

**b.** heimflutningi, sambært grein 11.00. Treytin er, at heimflutningurin er í fyrru helvt av tíðini, ferðin varar,

# Ársferðatrygging

**c.** ferðasliti, sambært grein 13.00. Treytin er, at ferðaslitið er í fyrru helvt av tíðini, ferðin varar,

**d.** deyða, orsakaður av bráðkomnari sjúku ella skaða, sambært grein 10.00, í fyrra helmingi av ferðini.

**18.02 Hvussu verður endurgoldið**
Tryggingin veitir endurgjald upp til 30.000 kr. fyri einstakling og upp til 60.000 kr. fyri húski.

Endurgjaldið verður roknað grundað á tær skjalprógvaðu útreiðslurnar, sum ferðin hevur kostað, og sum ikki kunnu verða endurgoldnar.

Við ferðaútreiðslur er at skilja:
Útreiðslur til flutning og gisting, umframt útreiðslur til útferðir og tiltøk, sum ikki kundi farast til orsakað av hending, ið er nevnd omanfyri undir grein 18.01, a. til d., sum eru goldnar og sum ikki kunnu verða endurgoldnar.

Talið av samdøgrum verður ásett soleiðis:

- Avstað- og heimferðardagar verða roknaðir sum tveir heilir dagar, uttan mun til hvørja tíð á degnum farið verður avstað og komið verður heim aftur.
- Tað verður ikki veitt endurgjald longri enn til tann dagin ferðin upprunaliga var ætlað at enda.

Endurgjaldið verður roknað frá og við tí degi, tá tryggjaði fór til lækna, varð innlagdur á sjúkrahús, fór heim frá ferða-málinum í sambandi við hending nevnd í greinunum 10.00, 11.00 ella 12.00 ella doyði.

Endurgjaldið verður roknað til og við tann dagin tryggjaði varð útskrivaður av sjúkrahúsi ella til tryggjaði aftur kann taka lut í ella fremja virksemið, sum ætlað.

**18.03 Hvør hevur rætt til endurgjald**

**a.** Húskið:
Tryggingin veitir endurgjald til tey tryggjaðu, sambært grein 2.00, sum eru við á ferðini.

**b.** Tryggjaði og ein ferðafelagi:
Ferðast tryggjaði saman við einum ferðafelaga, sum hevur keypt ferðina við tí endamáli at ferðast saman við tryggjaða, veitir tryggingin endurgjald fyri tryggjaða og ferðafelagan. Tað er galdandi sjálvt um ferðafelagin ikki er fevndur av grein 2.00.

**c.** Tryggjaði og fleiri fólk ferðast saman:
Ferðast tryggjaði saman við fleiri fólkum, veitir tryggingin bert endurgjald fyri tryggjaða.

**d.** Einstaklingatrygging:
Hevur tryggjaði teknað einstaklingatrygging, sí grein 2.06, rindar tryggingin bert fyri tryggjaða.

**Bil við á ferðini**
Í teimum førum, tryggjaði hevur bil við á ferðini, verða flutningsútreiðslurnar til og frá frítíðarstaðnum endurgoldnar sambært galdandi taksti í Føroyum. Harafturat verða útreiðslur endurgoldnar fyri goldnan frítíðarsteðg ella tílíkt, sum tryggjaði ikki hevur brúkt og ikki kann fáa endurgoldið ella hevur brúkt, meðan hann hevur verið sjúkur. Somuleiðis verða útreiðslurnar endurgoldnar fyri flutning av fólki og bili millum Føroyar og frítíðarlondini.

**Charterferðir**
Keypir tú eina charterferð við fráferð uttan fyri Føroyar, hevur tú rætt til endurgjaldsferð fyri sjálva charterferðina, um tú hevur verið lagdur á sjúkrahús, ella lækni hevur rátt tær til frið og hvíld í og nær við frítíðarbústaðin í meira enn helvtina av sjálvari charterferðini.

Ferðaútreiðslurnar millum Føroyar og har charterferðin byrjaði, verða endurgoldnar, um tú hevur verið sjúkur ella skaddur í meira enn helvtina av allari ferðini.

**18.05 Samdøgursendurgjald**

**Tryggingin fevnir um**
Tryggingin veitir endurgjald í teimum førum har einstøk samdøgur á ferðini hjá teimum tryggjaðu sambært grein 2.00 fara fyri skeyti av:

**a.** bráðkomnari sjúku, ella skaða sambært grein 10.00. Treytin er, at tryggjaði er lagdur á sjúkrahús, ella lækni hevur rátt tryggjaða til frið og hvíld í og nær frítíðarbústaðin. Tað er av týdningi at hava nágreiniliga lýsta læknaváttan o.tl. heim við av ferðini.

**b.** heimflutningi, sambært grein 11.00,

**c.** ferðasliti, sambært grein 13.00,

**d.** deyða, orsakaður av bráðkomnari sjúku ella skaða, sambært grein 10.00.

Tryggingin veitir ikki samdøgursendurgjald um tey tryggjaðu hava rætt til endurgjaldsferð.

# Ársferðatrygging

**18.06 Hvussu verður endurgoldið**
Endurgjaldið verður ásett soleiðis:
Kr. 1.500 pr. dag pr. tryggjaða, sum er sjúkur.
Tó í mesta lagi kr. 15.000.

Endurgjaldið kann ikki vera hægri enn samlaða ferðin kostar.

Talið av samdøgrum verður ásett soleiðis:

- Avstað- og heimferðardagar verða roknaðir sum tveir heilir dagar, uttan mun til hvørja tíð á degnum farið verður avstað og komið verður heim aftur.
- Tað verður ikki veitt endurgjald longri enn til tann dagin ferðin upprunaliga var ætlað at enda.

Endurgjaldið verður roknað frá og við tí degi, tá tryggjaði fór til lækna, varð innlagdur á sjúkrahús, fór heim frá ferðamálinum í sambandi við greinarnar 10.00, 11.00 ella 13.00 ella doyði.

Endurgjaldið verður roknað til og við tann dagin tryggjaði varð útskrivaður av sjúkrahúsi ella til tryggjaði aftur kann taka lut í ella fremja virksemið, sum ætlað.

## 19.00 Viðføri

**19.01** Viðvíkjandi viðføri verður víst til Innbúgvstrygging tína.

**19.02** Sum ískoyti til Innbúgvstryggingina fevnir Ársferðatryggingin um:

**a.** Virkna Skaðahjálp, sí grein 52.00, við upp til 10% av tryggingarhæddini fyri innbúgv, tó í mesta lagi kr. 15.000 fyri hvørt tryggingarskjal.
Virkin Skaðahjálp verður mótroknað í endurgjaldinum fyri viðføri í Innbúgvstryggingini,

**b.** Endurgjaldskeyp í førum, tá innskrivað viðføri er seinkað meira enn 5 tímar eftir, at væntað var, at tað var komið fram í útlondum. Endurgjaldið er kr. 1.200 pr. dag, tó í mesta lagi kr. 4.800. Tá viðførið er seinkað, skal váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verða løgd við.

## 20.00 Ov seint framkomin á uttanlandsferð

**20.01 Tryggingin fevnir um**
Útreiðslur, tá tryggjaði av ikki uppibornum og óvæntaðum orsøkum er ov seinur til alment flutningsfar, ella flutningsfar, sum tann, ið skipar fyri ferðini, hevur fingið til vega, og tryggjaði tí ikki er við í ferðini, sum ætlað.

**20.02** Hvussu verður endurgoldið
Tryggingarhæddir:
Fyri at fullføra ferðina: Óavmarkað
Fyri vistarhald: 1.500 kr. pr. dag.

Tryggingin veitir endurgjald fyri hóskandi, neyðugar og skjalprógvaðar eykaútreiðslur, til at koma upp í aftur skipaða ferðaleið, fyri flutning og rímiligar útreiðslur fyri vistarhald á hotelli.

**20.03 Avmarkingar**
Fyri at fáa endurgjald, skal:

**a.** ferðaseðilin vera umbiðin og goldin í seinasta lagi 18 tímar fyri fráferð,

**b.** tryggingin vera umbiðin og goldin í seinasta lagi 24 tímar, áðrenn ætlaða fráferð úr Føroyum,

**c.** tíðarskeiðið millum flogfør uttanlanda svara til Minimum Connecting Time fyri viðkomandi flogfaraskifti,

**d.** tíðarskeið millum flogfør uttanlanda svara í minsta lagi til tað, sum viðkomandi flogfelag/floghavn krevur.
Tó við nýggjari innskiving, skal hædd vera tikin fyri rímiligari tíð at innskriva seg og/ella viðføri av nýggjum v.m.

**e.** váttan frá flutningsfelagnum og onnur týðandi skjøl, sum vísa eykaútreiðslurnar og hví seinkanin varð, latast okkum.

## 21.00 Ferðin úr Føroyum ella til Føroya seinkað

**21.01 Tryggingin fevnir um**
Tryggingin fevnir um óváttaðar eykaútreiðslur fyri hvørt byrjað samdøgur, um tryggjaði, eftir galdandi ferðaætlan, verður seinkaður meira enn 8 tímar á veg úr Føroyum ella aftur til Føroya.

**21.02 Viðurskifti tá skaði er**
Váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum, skal latast okkum.

**21.03 Hvussu verður endurgoldið**
Tryggingarhæddir: Kr. 1.000 pr. dag.
Max. kr. 4.000.

betri trygging

# Ársferðatrygging

## 22.00 Frítíðaríbúðartrygging

**22.01 Tryggingin fevnir um**
Tryggingin fevnir um útreiðslur at leiga samsvarandi frítíðaríbúð ella útreiðslur til vistarhald á hotelli, um so er, at frítíðaríbúðin hjá tryggjaða ikki er verandi í av skaðaorsøk.

**22.02 Hvussu verður endurgoldið**

| | |
|---|---|
| Tryggingarhæddir: | Max. kr. 2.000 pr. dag. |
| | Max. kr. 25.000 pr. tr. |

## 23.00 Skeiv læknalig viðgerð

**23.01 Tryggingin fevnir um**
Tryggingin fevnir um varandi mein orsakað av skjalprógvaðari skeivari læknaligari viðgerð í beinleiðis sambandi við eina hending, ið grein 10.00 fevnir um.

**23.02** Endurgjaldsábyrgdin verður ásett sambært megin-reglunum í lóg um sjúklingatrygging.

**23.03** Støddin av endurgjaldinum verður ásett sambært lóg um endurgjaldsábyrgd.

**23.04** Tryggingarhæddin er í mesta lagi kr. 1.000.000 pr. ferð.

## 24.00 Leiting og bjarging

**24.01 Tryggingin fevnir um**
**a.** Leiting og bjarging innan fyri ein radius av 50 km frá tí staðnum, har tryggjaði seinast er sæddur.

**b.** Bjarging, eftir at tilhaldsstaðurin hjá tryggjaða er staðfestur.

**24.02 Tryggingin fevnir ikki um**
**a.** Gjald fyri leiting og bjarging til myndugleikar og feløg, sum vanliga arbeiða sjálvboðin og/ella ólønt við tílíkum uppgávum.

**b.** Leiting í sambandi við gíslatøku ella burturflyting.

**c.** Leiting og bjarging norðan fyri 75. breiddarstig ella á Suðurpólinum ella í økjum, har myndugleikar á staðnum ella aðrir almennir myndugleikar krevja, at fólk hava serstøk loyvi til at vera har. Tað er t.d. galdandi í póløkjunum, á ferðum tvørtur um innlandsísin í Grønlandi og í norðasta parti av Kanada.

**d.** Leiting, sum er sett í verk av avvarandi, tí tryggjaði hevur latið vera við at siga frá, hvar hann er staddur ella tí familjan ella onnur vilja hava samband við tryggjaða.

**24.03** Tað er ein treyt, at hendingin er fráboðað løgregluni ella lokalu myndugleikunum á staðnum, og at nevndu myndugleikar hava sett leiting í verk.

**24.04** Hvussu verður endurgoldið

**24.05** Tryggingin veitir endurgjald upp til 400.000 kr. pr. hending fyri tey tryggjaðu tilsamans.

**24.06** Fyri hvørja hending er ein sjálvábyrgd uppá 10%, tó í minsta lagi 2.500 kr.

## 25.00 Kreppuhjálp

**25.01 Tryggingin fevnir um**
Um tú kemur í eina bráðfeingis sálarliga kreppu í sambandi við:
**a.** rán
**b.** álop
**c.** hóttan
**d.** vanlukku, íroknað ferðsluvanlukku
**e.** eld, spreinging ella innbrot
**f.** álvarsliga sjúku ella deyða
**g.** náttúruvanlukku
**h.** yvirgang, kríggj og krígslíknandi støðu
**i.** gíslatøku
**j.** leiting og bjarging kanst tú fáa kreppuhjálp.

**25.02** Læknin hjá SOS-International ger av, um og hvat slag av kreppuhjálp skal setast í verk. Kreppuhjálp kann verða veitt í sambandi við størri vanlukkur ella ógvusligar tilburðir.

Endurgjaldið kann fevna um kreppuhjálp á staðnum ella sálarfrøðiliga hjálp um telefon. Kreppuhjálpin endar, tá tú kemur aftur til Føroya.

## 26.00 Kreppuhjálp til avvarðandi um telefon

**26.01** Um tryggjaði hevur rætt til kreppuhjálp sambært grein 25.00, fevnir tryggingin um útreiðslur til kreppuhjálp um telefon til tey avvarðandi hjá tryggjaða. Tað er ein treyt, at lækni ella sálarfrøðingur hjá SOS-International metir, at kreppuhjálp til tey avvarðandi er neyðug.

# Ársferðatrygging

## 27.00 Sálarfrøðihjálp

**27.01 Tryggingin fevnir um**
Hevur tú verið fyri álvarsligari sjúku, álvarsligum skaða, neyðtøku, álopi, ráni ella líknandi skelkandi uppliving á ferðini, veitir tryggingin endurgjald fyri viðtalu hjá sálarfrøðingi/sálarlækna í Føroyum ella uttanlands, í mesta lagi kr. 10.000.

## 28.00 Yvirgangur

**a.** Um tryggjaði verður beinleiðis raktur av yvirgangi, sum førir persónskaða við sær, fevnir tryggingin um neyðugar eykaútreiðslur til heimferð/heimflutning til Føroya fyrr enn ætlað, um neyðugt við sjúkraflutningsflogfari. Tað er ein treyt, at læknin hjá SOS-International metir, at heimflutningur er neyðugur, og at flutningurin er fingin í lag sambært avtalu við SOS-International.

**b.** Um tryggjaði óbeinleiðis verður raktur av yvirgangi, sum førir persónskaða á onnur enn tryggjaða við sær, fevnir tryggingin um neyðugar eykaútreiðslur til heimferð til Føroya fyrr enn ætlað. Tryggingin rindar upp til helvtina av tí, sum tryggjaði hevur goldið fyri flutningin.

**Undantøk og avmarkingar**
**a.** Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at framskundaða heimferðin førir við sær, at tryggjaði er aftur í Føroyum fyrr enn 72 tímar áðrenn upprunaliga ætlað.

**b.** Tryggingin fevnir ikki um heimferð, ið er sett í verk av ferðasmiðinum ella almennum myndugleikum.

## 29.00 Evakuering

**29.01 Tryggingin fevnir um**
Um danska Uttanríkismálaráðið ella myndugleikarnir á staðnum mæla til evakuering og/ella heimferð í sambandi við:
**a.** hóttandi vanda fyri, at kríggj brestur á
**b.** at kríggj brestur á
**c.** krígslíknandi støðu
**d.** yvirgangsatgerðir
**e.** náttúruvanlukkur
**f.** farsótt
meðan tú ert í økinum, veitir tryggingin endurgjald.

**29.02** Tað er ein treyt, at tú, um umstøðurnar loyva hesum, í stundini fer úr økinum eftir viðmæli frá danska Uttanríkismálaráðnum ella myndugleikunum á staðnum.

**29.03 Hvussu verður endurgoldið**
**a.** Tryggingin veitir endurgjald fyri útreiðslur til evakuering og/ella eykaútreiðslur til møguliga heimferð.

**b.** Tryggingin veitir endurgjald fyri mistum ella skaddum viðføri, sum er eftir, tí tú ert evakueraður ella farin heim.

**29.04 Tryggjaði afturhildin**
Tryggingin veitir endurgjald fyri eykaútreiðslur, um tú verður afturhildin av myndugleikunum í einum landi, har støðan er ein av teimum, ið nevndar eru í grein 29.01.

Endurgjald verður veitt fyri:
a. uppihald og innanríkisflutning
b. mat upp til kr. 500 pr. dag

Tryggingin veitir endurgjald upp til 3 mánaðar og í mesta lagi kr. 60.000.

**29.05 Tryggingin fevnir ikki um**
**a.** um ferðin til vandaøkið byrjar, eftir at danska Uttanríkismálaráðið ella myndugleikarnir á staðnum hava viðmælt evakuering ella heimferð,

**b.** um tú áður hevur latið vera við at fylgja boðum frá danska Uttanríkismálaráðnum ella myndugleikunum á staðnum um evakuering.

## 30.00 Gíslatøka

Um tryggjaði hevur verið hildin gísli fevnir tryggingin um:

**a.** neyðugar eykaútreiðslur til flutning heim til Føroya, um neyðugt við sjúkraflutningsflogfari. Tað er ein treyt, at læknin hjá tryggjaða metir, at heimflutningur er neyðugur, og at flutningurin er fingin í lag sambært avtalu við SOS-International,

**b.** eykaútreiðslur til gisting á hotelli, flutning á staðnum og mat,

**c.** leinging av tryggingartíðarskeiðnum, um tryggingartíðarskeiðið endar, meðan tryggjaði verður hildin gísli. Leingingin er galdandi frá upprunaliga tryggingartíðarskeiðið endar, til tryggjaði kemur heim til Føroya – tó í longsta lagi í 14 dagar eftir, at tryggjaði er leyslatin.

# Ársferðatrygging

**30.01 Tryggingin fevnir ikki um**
**a.** útreiðslur til kanningararbeiði í sambandi við gíslatøku,

**b.** útreiðslur til loysigjald,

**c.** ein og hvønn skaða orsakaður av tilburðum, sum henda í økjum har kríggj, krígslíknandi støður, uppreistur ella borgarligur ófriður er.

## 31.00 Ítróttur

**31.01 Tryggingin fevnir um**
Um so er, at tú ikki ert førur fyri at fremja ætlaðu ítróttina, vegna bráðkomnari sjúku ella skaða á ferðini, sí grein 10, veitir tryggingin endurgjald soleiðis:

**a.** kr. 300 pr. dag, um tú hevur rætt til endurgjaldsferð,

**b.** kr. 600 pr. dag í øðrum førum,

**c.** í mesta lagi kr. 3.000 fyri goldnar skjalprógvaðar útreiðslur til ætlað tiltøk og leigaða ítróttarútgerð, sum tú ikki kanst fáa afturgoldnar.

**31.02** Treytin fyri endurgjaldi er, at læknin á frítíðarstaðnum váttar, at ætlaða ítróttin ikki kundi íðkast vegna sjúku ella skaða.

**31.03** Endurgjaldið verður veitt frá tí degi, tú fert til lækna og heldur uppat tann fyrsta av hesum døgum:

**a.** tá tú ert førur fyri at íðka ítróttina aftur,
**b.** ætlaða heimkomudagin,
**c.** dagin, tryggingin fer úr gildi.

## 32.00 Leigubilur undan fráferð treytað av, at skrokktrygging er teknað fyri bilin

**32.01** Um so er, at tryggjaði hevur teknað skrokktrygging fyri bilin í Betri Trygging og ein skrokkskaði hendir, beint undan fráferð úr Føroyum, kann endurgjald verða latið fyri útreiðslur at leiga annan bil. Hesar útreiðslur verða endurgoldnar av tíni skrokktrygging fyri bilin.

## 33.00 Leigubilur uttanlands – sjálvábyrgd

**33.01** Tryggingin fevnir um útreiðslur av sjálvábyrgd í sambandi við skrokkskaða á personbil, motorsúkklu ella prutl, ið tryggjaðu hava leigað uttanlands.

**33.02 Tryggingin veitir ikki endurgjald, um:**
**a.** akfarið, ikki er skrokktryggjað,

**b.** tryggjaðu, sambært lóggávuni í viðkomandi landi, ikki hevur loyvi at koyra akfarið.

## 34.00 Ársavlýsingartrygging

**34.01** Um tú hevur teknað Ársavlýsingartrygging, sæst hetta í tryggingarskjalinum.

**34.02 Hvat er ársavlýsingartrygging**
Um tú fert eina uttanlandsferð, kann Ársavlýsingartryggingin veita endurgjald, um ferðin má avlýsast áðrenn fráferð, vegna eina av umstøðunum nevndar í grein 34.06.1.

**34.03 Nær skal tryggingin teknast**
Tryggingin skal teknast í seinasta lagi 14 dagar áðrenn fráferð, ella tá tú keypir ferðina.

**34.04 Nær tekur tryggingin við**
Tryggingin tekur við frá tí degi, tú teknar tryggingina. Í sambandi við einstøku ferðina, tekur tryggingin við, tá tú keypir ferðina og heldur uppat, tá ferðin byrjar, t.v.s. tá tú fert úr bústaði tínum.

**34.05 Hvat verður endurgoldið**
Endurgjaldið fevnir um tann partin av ferðakostnaðinum, sum tú ikki fært endurgoldnan, um so er, at tú avlýsir ferðina.

Um tú hevur teknað Ársferðatrygging fyri húskið, er endurgjaldið í mesta lagi kr. 60.000 fyri hvørja einstaka ferð.

Um tú hevur teknað Ársferðatrygging fyri einstakling, er endurgjaldið í mesta lagi kr. 30.000 fyri hvørja einstaka ferð.

**34.06** Tryggingin fevnir um avlýsing av ferðini orsakað av

**34.06.1** At tú ikki kanst fara ætlaðu ferðina, tí:
**a.** tú sjálvur
**b.** hjúnafelagi/sambúgvi
**c.** foreldur
**d.** verforeldur
**e.** børn
**f.** fosturbørn
**g.** børn hjá systkjum
**h.** verdóttir og versonur
**i.** ommu- og abbabørn

# Ársferðatrygging

**j.** systkin
**k.** omma/abbi
**l.** svigarinna/svágur
**m.** *ferðafelagi
**n.** **ferðaleiðari
**o.** langomma/langabbi
**p.** langommu- og langabbabarn
verður/verða fyri:

**1.** álvarsamari bráðkomnari sjúku/skaða, sum krevur sjúkrahúsinnlegging
**2.** sjúku/skaða, og lækni mælir til seingjarlegu
**3.** sjúku/skaða, og lækni metir, at tað ikki er ráðiligt, at farið verður ætlaðu ferðina
**4.** deyða

***** Ein ferðafelagi er ein, sum hevur keypt ferðina við tí endamáli at ferðast saman við tryggjaða. Vanliga er hesin nevndur á sama ferðaseðli/ferðaskjali sum tryggjaði.

****** Ein ferðaleiðari er ein persónur, sum áðrenn ferðin varð keypt er settur sum leiðari av ferðini, og sum við síni vitan og serkunnleika er av avgerandi týdningi fyri ferðina.

**34.06.2** Skaða av eldi, spreinging, vatni, stormi ella innbroti í bústaði ella virki tínum, og hetta hendir beint áðrenn fráferðina, og tað er neyðugt, at tú verður verandi heima.

**34.06.3** Svikagerð á virki tínum, sum onkur, ið starvast á virkinum, hevur framt áðrenn fráferðina, og tað er neyðugt, at tú verður verandi heima. Tað er ein treyt, at løgreglu-frágreiðing er skrivað.

**34.06.4** Arbeiðssteðgi, vegna sáttmálabrot á virki tínum, beint áðrenn fráferðina.

**34.06.5** At tú óviljað verður uppsagdur beint áðrenn fráferð, av tí at virkið, har tú hevur starvast seinastu árini í minsta lagi 20 tímar um vikuna, heldur uppat ella minkar um virksemið.

**34.06.6** At tú av læknaligum orsøkum ikki tolir koppseting, sum brádliga og óvæntað verður kravd, tá ferðast verður til tað ferðamálið, tú ætlar at fara til.

**34.06.7** At tú ikki stendur eina roynd á lærdum háskúla ella líknandi hægri lærustovni, har tú lesur fulla tíð, og tí skal til nýggja roynd. Tað er ein treyt, at ferðin varð keypt, áðrenn miseydnaðu royndina, og at nýggja royndin er í ferðatíðini ella í seinasta lagi eina viku eftir ætlaða heimkomu.

**34.06.8** At tryggjaði ikki fær luttikið í ætlaðum virksemi/aktiviteti á ferðini. Tað skal kunna skjalprógvast, at hetta virksemið er endamálið við ferðini.

**34.06.9** At eitt alment fyriskipað tiltak uttanlands, t.d. fótbóltsdystur, konsert ella sjónleikur verður avlýst. Tað skal kunna skjalprógvast, at tað avlýsta tiltakið er endamálið við ferðini.

**34.06.10** At hóttandi vandi er fyri einari av fylgjandi hendingum í landinum/økinum uttanfyri Føroyar (ferða-málinum):

- Kríggi ella krígslíknandi støðum
- Yvirgangi
- Náttúruvanlukkum
- Farsótt

Tað er ein treyt, at danska uttanríkismálaráðið ræður fólki frá at ferðast í landinum/økinum.

**34.06.11** Hjúnaskilnaði, sundurlesing ella at samlívið millum tryggjaða og samliva endar og bæði nú búgva, hvør á sínari fólkayvirlitsadressu.

Tað er ein treyt, tá samlív endar, at bæði undan slitinum hava havt somu fólkayvirlitsadressu í í minsta lagi 12 mánaðar áðrenn samlívið endaði.

**34.06.12** At tú er við barn og lækni metir, at tú ikki kann ferðast, tí tað eru umstøður við viðgongutíðini, sum gera, at tað ikki er ráðiligt at ferðast. Talan kann t.d. vera um, at vandi er fyri at eiga ov tíðliga.

**34.07. Tryggingin fevnir ikki um**
Tryggingin veitir ikki endurgjald, um so er, at:

**a.** avlýsta ferðin er ein partur av samlaðu tryggjaðu ferðini,

**b.** tryggjaði, tá tryggingin varð teknað, visti um hendingina, sum var orsøkin til avlýsingina,

**c.** tryggjaði, tá ferðin varð keypt, visti um hendingina, sum varð orsøkin til avlýsingina,

**d.** endamálið við avlýstu ferðini var annað enn frítíðarferð.

# Ársferðatrygging

## 50.00 Felagstreytir

## 51.00 Tørvar tær hjálp á ferðini

Ring til:
SOS-International
Telefon: +45 38 48 91 22
Telefax: +45 70 10 50 56
Teldupostur: sos@sos.eu

## 52.00 Virkin skaðahjálp

SOS-International skipar fyri skaðatænastu á staðnum. Virkin Skaðahjálp merkir, at skaði, sum endurgjald verður veitt fyri, kann verða heilt ella lutvíst avgreiddur á ferðini.
Endurgjaldið kann verða avmarkað og treytað av bráðfeingis fíggjarliga tørvinum, av tí at endalig skaðaviðgerð fer fram, tá tú ert komin heimaftur av ferðini.

## 53.00 Tá skaði er

Skaði skal beinanvegin fráboðast til:
Betri Trygging
Telefon: +298 348600
Teldupost: betri@trygging.fo

Tú hevur skyldu at geva Betri Trygging tær upplýsingar, sum eru neyðugar til støðutakan fyri endurgjaldi.

Er persónskaði, kann Betri Trygging til eina og hvørja tíð fáa til vega neyðugar upplýsingar til viðgerð av skaðanum. Talan kann vera um upplýsingar viðvíkjandi núverandi og fyrrverandi heilsustøðu tíni.

## 54.00 Tryggingarhæddir

Tær tryggingarhæddir, sum standa í tryggingarskjalinum/-kortinum og tryggingartreytunum um tær einstøku tryggingarveitingarnar, eru hámark fyri endurgjaldsskylduni hjá Betri Trygging fyri hvørja tryggingarveiting, sum hevur verið í tryggingartíðini.

## 55.00 Vanlig undantøk

Tryggingin veitur ikki endurgjald:
**a.** Um so er, at tryggjaði hevur elvt til tryggingartilburðin við vilja ella grovum ósketni,

**b.** Um so er, at tryggjaði hevur elvt til tryggingartilburðin ávirkaður av rúsdrekka, narkotiskum evnum, misnýtslu av heilivági ella øðrum rúsevnum,

**c.** Um tryggjaði hevur verið við í vísindaligum rannsóknarferðum,

**d.** Um tryggjaði hevur verið flogskipari ella annar flogskipari í flogfari,

**e.** Fyri skaða, sum er beinleiðis ella óbeinleiðis avleiðing av verkfalli, verkbanni, handtøku, at almennir myndugleikar leggja hald á ella gera aðrar fyriskipanir, sí tó grein 17.03,

**f.** Fyri skaða av kjarnorku, geislavirknum evnum, geisling frá geislavirknum brennievni ella burturkasti,

**g.** Fyri skaða orsakað av kríggi, krígslíkum atgerðum, uppreistri ella borgaraófriði. Tó veitir tryggingin endurgjald fyri skaða íkomin innan 24 tímar frá, at nevndi ófriður brestur á.

Sí tó greinarnar 25.01 h., 29.01 a. til c. og 34.06.10.

## 56.00 Aðrar tryggingar

Tryggingin svarar ikki fyri endurgjaldi, som onnur trygging – Norðurlendska Samstarvsavtalan ella sáttmálin millum Stóra Bretland og Føroyar – svarar fyri. Hetta undantak er tó ikki galdandi fyri vanlukkutrygging.

## 57.00 Dupulttrygging

Er onnur trygging, sum svarar fyri skaðanum fult ella lutvíst, hevur Betri Trygging bert skyldu at rinda sín lutfalsliga part.

## 58.00 Endurgjaldskravið avhendað

Sambært tryggingini kann eingin veðseta ella avhenda rættindisíni uttan at hava fingið samtykki felagsins.

betri trygging

# Ársferðatrygging

## 59.00 Aftursókn

Verður útgoldið sambært hesi trygging, kemur felagið uppí allan tann rætt, tryggjaði hevur.

## 60.00 Ósemjur

**60.01** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**60.02** Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaða-avgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**60.03** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**60.04** Um semja ikki fæst, eru tveir møguleikar at fara víðari við málinum, sí greinarnar 61.00 og 62.00.

## 61.00 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F

**61.01** Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

**61.02** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**61.03** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

**61.04** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:

Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
ella við teldubrævi til: betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

## 62.00 Kærunevndin

**62.01** Kærast kann beinleiðis til donsku kærunevndina, uttan fyrst at kæra til innanhýsis kæruviðgeran.

**62.02** Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

**62.03** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður.

Sí: www.ankeforsikring.dk

**62.04** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**62.05** Kæran skal sendast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00

## 63.00 Angringarrættur

63.01 Tryggingin kann verða strikað frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum trygg-ingarfelagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

## 64.00 Heimating

Sakarmál móti Betri Trygging verða tikin upp í Føroya Rætti.